

Óli Jacobsen
olijacobsen@post.olivant.fo



*Høgt er upp*

nevndir tveir, Jens Klæmint Isaksen og Eiler Jacobsen.

**7. Jóan Jakku** f. 1853. Hann giftist við Elsupu Lukassen úr Skopun. Tey fingu trý børn.

Tey sum hava áhuga fyri hesum partinum av Dímunarættini, kunnu fara inn á www.fiskimannafelag.fo pdf. fílur av FF-blaðnum nr. 369.

Jóannes søkti eina ferð um at festa Lítlu Dímun og ætlaði at búseta seg har. Men hetta fekk hann ikki loyvi til, tí har var so ikki búgvandi.

## Fyrsti hentleikin

Emil Løbner var Føroya fyrsta amtmaður fyrst í 19. øld. Hann hevur ringt orð á sær fyri hansara jánkasliga atburð, tá ið Havnin varð álopin av Brillumannin.

Men á øðrum økjum var hann ikki so galin. Hann skipaði fyri høgdum trappum og tógverk til gelendara á Stóru Dímun. Tað lætti nógv um, hóast tað framvegis bæði var strævið og vandafult at koma uppá oynna.

## Óla Jákup, oldurabbi, tekur við

Men Janusi varð ikki langt lív lagað. Tá ið hann hevði havt oynna í 13 ár doyði hann í 1820, 44 ára gamal av sjúku. Tað sigst, at hann doyði av overving.

Greta giftist aftur í 1822 við Jógvan Johannesen úr Dalsgarði í Skálavík. Greta vildi ongum lata festið uttan elsta soninum Óla Jákupi. Jógvan bleiv tískil bóndi inntil Óla Jákup oldurabbi kundi taka við.

Viderø prestur var langabbasonur teirra. Hann greiðir frá, at Jógvan var raskur sum bóndi og gudrøkin maður. Áðrenn hann fór til Dímunar, var hann røktingarmaður í Norðastahaga í Skálavík. Hendan hagan, ið hevði ligið í órøkt, fekk hann upp aftur á føtur. Hjúnarlagið við Gretu var ikki gott. Hon helt lítið um hansara gudrøkni, og um at hann sang við børnunum, áðrenn hann fór í bjørgini ella til annað arbeiði. Hon skuldi tá taka til: "Eg meini, at hasin lítli látifuglurin er farin at syngja í morgun." Hon rýmdi fleiri ferðir av oynni, men kom aftur. Hon endaði sínar dagar í Øravík. Jógvan varð verandi í Dímun, og har doyði hann í 1857.

Tey fingu tvey børn:

**1. Jóannes** f. 1822. Hann giftist við Árabo Viderø á Sandi, og tey búsettust undir Gerðabrekku í Skálavík. Tey fingu sonin Jógvan Mikal, sum er ættarfaðir til Viderø-fólkið.

**2. Anna Margretha** f. 1832. Giftist til Sands.

## Óla Jákup datt oman

Óla Jákup tók við festinum tann 4. september 1830. Kona hansara var Guðrun Mortensen f. 1798 úr Trøðum á Sandi. Hon var 11 ár eldri enn hann

Tey áttu trý børn, tvær gentur og ein drong. Drongurin Janus doyði um 20 ára gamal av hálsasjúku, tað mann hava verið difteritus. Hann doyði á Tvøroyri og liggur grivin har.

Í 1840 vóru 19 fólk á Stóru Dímun. Tað vóru bóndahjúnini og teirra trý børn. Hini vóru ættarfólk og sjey tænastufólk.

Eftir at Janus doyði, vóru bert tær báðar døturnar eftir.

Vanlukkur hendu nærum ár um ár. Í 1845 fekk Tummas Johan Dalberg úr Sumba ein stein í høvdið og doyði. Abraham Abrahamsen úr Havn fall í bjørgunum í 1847, 29 ára gamal.

Og so hendi tað, at Óla Jákup datt oman á Dráttinum tann 10. november 1849, bert 49 ára gamal.



*Á hesin myndini sæst trapputrinini, har prestur snávaði og datt oman*

Janus beiggi hansara, sum búði á Tvøroyri, hevði verið í Dímun og smíðað. Eisini hevði hann umvælt kirkjuna. Vanlukkan hendi, tá ið hann fór avstað aftur.

Teir vóru við at taka ymiskt niður, sum skuldi sendast av oynni. Men maðurin, sum sat við línuna var óansin, og strok kom á línuna. Ein bukt kom um bóndan, so hann varð tikin útav og fór eftir høvdinum.

Tað 60 favna høga fallið á helluna niðri undir var ræðuligt. Kroppurin, sum kom standandi niður, smildraðist sundur.

Eingin troystaði sær rættuliga at fara oman á helluna at taka hin deyða bóndan upp, so illa, sum hann var farin. Men húskallurin Óla Jákup Johannesen úr Dali var av grovastu monnum, tiltikin róligur og nervasterkur.

Hann styrkti seg við brennivíni, tók so eina rekkjuváð, signaði seg og gekk tryggur og róliga oman Kleivina at savna líkið av bóndanum saman í rekkiváðina.

Náttina eftir kom bóndin í dreymi til hansara. Hann takkaði Óla Jákup fyri hansara vælgerð, men ein likamspartur var eftir, fremsti liður á aftasta fingri. Dagin eftir fer Óla Jákup aftur at leita, men finnir einki.

Somu nátt kom bóndin aftur í dreymi og segði við Óla Jákup, at hann skuldi ikki leita meira eftir fingrinum, tí hann var stokkin so langt inn í eina urð, at hann fanst ikki.

Tað segðist, at Rasmus, beiggi bóndan, mundi gjørt av við mannin, sum misti línuna, men fólk fekk lagt seg ímillum.

## Nógvar vanlukkur

Tað hendu ótrúliga nógvar vanlukkur í Dímun. Tað eru ikki færri enn 23, sum eru deyð av vanlukku, meðan okkara ætt hevur verið í Dímun.

Ein vanlukka á landi var, tá ið Rudolf Jensen prestur fall í Kleivina tann 24. august 1874, 42 ára gamal.

Har presturin fór vóru 5-6 høgd trin. Hann gekk undan konuni. Tá hann er komin niður á slætt á ein pall, vendi hann sær at hjálpa konuni. Onkursvegna var hann áhaldsin og datt 30-40 favnar niður og doyði av fallinum. Klivin, har hann datt, varð seinni kallað Prestklivin.

*Burtur í haga*



**Komandi partur**

Sum lesarin sær, er Miðvikan frá hesum partinum av skorin niður í eina helvt. Í komandi parti verður millum annað greitt frá, tá ið oldurabbi Høgna Hoydal setti upp á Stóru Dímun undir sera dramatiskum umstøðum